# Føroyskir listamálarar sum ambassadørar



*Øssur Mohr, listamálari her saman við Stanley Samuelsen, tónlistamanni og stjóranum á Skt. Gertrud gallaríi í Keypmannhavn*

*Mynd Jan Müller*

Tá tosað verður um føroyskt vinnulív so tengja vit tað næstan altíð saman við fiski. Men vinnulív er so nógv annað eisini. Føroyskir listamenn umboða t.d. eisini ein part av okkara vinnulívi. Og tá hugsað verður um at branda Føroyar, at selja mentan og list av landinum og harvið eisini at fáa fremmandafólk henda vegin, tá eigur okkara myndlist og okkara myndlistafólk ein týðandi um enn lítlan sess á hesi rók. Tað fer Vinnurásin á Rás2 m.a. at viðgera í sendingini týsdagin klokkan 16. Jan Müller hevur vitjað tríggjar føroyskar listamálarar, sum í løtuni sýna fram í Keypmannahavn, allir í hvør sínum gallarríi. Teir eru Øssur Mohr, Zacharias Heinesen og Bárður Jákupsson. Í samrøðunum verður eisini nomið við myndlistina í Føroyum í dag og hvussu hesir tríggir listamálararnir arbeiða og trívast í tí listarliga umhvørvinum.



*Zacharias Heinesen og Bárður Jákupsson, sum báðir hava framsýningar í Keypmannahavn*

*Mynd Jan Müller*

# DONG sær stórar møguleikar í Føroyum



Danska olju – og gassfelagið DONG er í dag tað mest virkna felagið vestan fyri Hetland, har tað hevur flest leitiloyvi. DONG er eisini sera virkið í Føroyum. Vinnurásin hevur hitt leitistjóran hjá felagnum, Jan Terja Edvardsen á høvuðstøðini í Hørsholm uttan fyri Keypmannahavn. Tosað verður um møguleikarnar at gera fleiri olju- og gass fund millum Føroyar og Hetland og um áhugan hjá felagnum at vera við til at finna føroysku oljuna og gassið. Jan Müller er vertur. Vinnurásin týsdagin eftir tíðindini klokkan 16.

*Jan Terji Edvardsen, leitistjóri hjá DONG sær stóra framtíð fyri sær á Atlantsmótinum, sum Føroyar eru partur av.*

*Mynd Jan Müller*

**26. februar 2009**

# Powerwriting

- fá skriviuppgávurnar frá hondini

**Max. 16 luttakarar - Fá pláss eftir!**

**Kennnir tú hetta aftur?**
- Stígur er komin í skrivingina
- Tú vendir og snarar tú hvørjum orðið
- Tú hevur ilt við at koma í gongd við at skriva ...ársfrágreiðingina, fundarfrásøgnina, marknaðarætlanina, fakligu greinina, bókina..

Nú er nóg mikið við at sita og stara at blanka pappírinum...

**Tú hevur eina rúgva** av ymiskum størri og smærri skriviuppgávum, sum liggja og bíða eftir tær. Men onkursvegna er stígur komin í skrivingina.

**Kanska tú setir ov stór krøv** um innihald í mun til uppgávu, og verður tí ikki liðug/-ur? Kanska brúkar tú alt ov nógva tíð - vendir og snarar hvørjum orðið? Ella hevur tú simpulthen ov nógv annað um oyruni? Samvitskan hevur tað einki serligt, og tað er ikki sørt tú kennir teg strongdan...

**Óansæð hvør orsøkin er**, er hjálp at heinta. Við nøkrum einføldum amboðum kanst tú fáa gongd aftur á skrivingina.

**26. februar** fer Bo Skjoldborg at halda skeið í Føroyum um powerwriting. So um tær tørvar hjálp at fáa gongd á skrivingina, eigur tú at melda til nú á www.synergi.fo.

Synergi

Synergi - Tvørgøta 13 - 100 Tórshavn - www.synergi.fo - synergi@synergi.fo - tel. 32BELL (322355)




**Tak strongd í álvara**
Sambært WHO er strongd nærum stórsta hóttanin móti fólkaheilsuni í vesturheiminum.

**Næstan øll kenna kensluna av strongd**
Tú kanst føla strongd tá tú hevur nógv at gera, bæði á arbeiðinum og heima. Kanska verður tú full/ur av energi og følir teg væl. Tað er tann jaligi parturin av strongd.

Tann neiligi parturin av strongd og tann ið varar longri, er tá tær væntar kontrol og ávirkan á tína egnu støðu. Tú verður simpulthen tappa/ur fyri orku. Hetta er strongd, sum tú skalt royna at sleppa undan, tí hetta er beinleiðis skaðiligt fyri heilsuna.

**Strongdin økist, tá kreppa rakar**
Tá vit dagliga hoyra atfyritøkur siga fólki úr starvið og aðrar fara á heysin, økist strongdin hjá flestu fólkum. Vit gerast ørkymlaði og ótrygg um framtíðina.

**Evni á degnum**
Hvat er strongd - Munurin á at hava nógv at gera og strongd - Jaligar og neiligar síður av strongd - At gerast varug/ur við egna strongd - Góð og virkin amboð fyri strongd - At síggja strongd hjá øðrum - Hví gerast vit alt meira strongd - Ongantíð aftur ov lítið av tíð! - At gerast "heil menniskju" - Uppbyggjandi loysnir til egnar strongdartrupulleikar

**Ger okkurt við strongdina**
Kom á skeið við Bjarna Toftegård, ein av fremstu skeiðshaldarum innan strongd í Danmark. Tú fært nøkur virkin amboð, sum tú kanst brúka, tá tú kemur aftur til arbeiðis.

Tilmelding á www.synergi.fo

Synergi

Synergi - Tvørgøta 13 - 100 Tórshavn - www.synergi.fo - synergi@synergi.fo - tel. 32BELL (322355)